# Ferðsluóhapp í vesturbýnum í Havn

**Hóast einki stórvegis rok var í býnum í nátt, hevur løgreglan ikki sitið hendur í favn. Tíðliga í morgun fór bilur av vegnum í Mattalág, ein maður varð tikin fyri rúsdrekkakoyring á Landavegnum og ein kvinna koyrd heim at sova rús av í Klaksvík**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Tíðliga í morgun, kl. 4.15., vórðu boð send eftir løgregluni, tí ein bilur var farin av vegnum í Mattalág. Bilførarin koyrdi vestureftir Jóannesar Paturssonar gøtu og út móti Mattalág, men tá hann kom til svingið, helt bilurin heldur beint áfram, fór av vegnum og niður í ánna.

Á løgreglustøðini verður sagt, at illgruni er um, at maðurin var ávirkaður av rúsdrekka. Men bilførarin, ið var einsamallur í bilunum, fekk ongan mein av tilburðinum. Og í morgun kom bilur frá Brandstøðini á Oyggjarvegnum og tók meiðslaða bilin upp úr ánni.



*Sum vit síggja, er bilurin rættiliga illa farin av tilburðinum - báðir stoytkoddarnir eru t.d. komnir út*

Hóast vegirnir kring landið hava verið heldur hálir í morgun, hava fólk ansa væl eftir. Og bert okkurt smávegis hevur verið boðað løgregluni.

Annars hevur náttin eisini verið avbæra friðarlig á løgreglustøðunum um landið. Ein maður varð tikin fyri rúsdrekkakoyring á Landavegnum kl. 2.18. í Havn, eftir at hava koyrt heldur óstøðugt á vegnum. Maðurin varð steðgaður, síðan handtikin fyri rúsdrekkakoyring og tikin við á støðina til blóðroynd. Og í Klaksvík hjálpti løgreglan eini kvinnu heim at sova rús av.

# Summarveður verður kavaveður í næstu viku



*Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur nýtur av tí fagra veðrinum*

**Fuglarnir syngja, blómurnar spretta og sólin skínur. Ein kundi trúð, at eg skrivi um julimánað, men hetta er veruleikin beint nú uttanfyri vindeygað – í februar mánaði**

VEÐRIÐ
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Seinastu vikurnar hevur veðrið verið sera gott. Sólin hevur skinið næstan hvønn dag, og lítið og onki regn hevur verið.

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, sigur at hetta ikki er óvanligt fyri februar mánað.

– Í fjør komu bara 65 millimetur av avfallið, higartil í februar eru 70 millimetrar komnir. Normalt fyri februar eru 114 millimetrar, sigur Petur Skeel Jacobsen.

Tað er eitt hátryst, sum hevur ligið omanfyri Føroyar seinastu tíðina, sum hevur gjørt at veðrið hevur verið so fagurt.

– Komandi dagarnar verður kaldari, og í næstu viku ferð hitin allan vegin niður í 5 minusstig. Væntandi kemur eisini eitt sindur av kava, sigur Petur Skeel Jacobsen.

Annars hevur alt árið verið ógvuliga lýtt, og tí hava blómur verið at sæð nógva staðni. Hesar fáa sær nokk ein dyggan smeit í næstu viku, tá kuldin kemur.

